Aksel V. Johannesen **Nr. 60/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um siglingina hjá Teistanum, settur landstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu nógv manglar í játtanini hjá SSL fyri at Teistin kann sigla tveir teir seinastu kvøldtúrarnar á ferðaætlanini á leið 60?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at Hasfjord røkir kvøldarsiglingina á leið 60?
3. Kunnu vit vænta, at henda ferðaætlanin verður galdandi líka til Sandoyartunnilin er liðugur?
4. Og um so er, hvussu væntar landsstýrismaðurin, at tað kemur at ávirka trivnað og mentan í oynni, at tað bert er pláss fyri 12 ferðandi umborð á Hasfjord?

Viðmerkingar:
Á almennum fundi 13. februar í Skopun, greiddu stjóri og onnur umboð fyri Strandfaraskip Landsins (SSL) frá, hvørjar tillagingar verða gjørdar á leið 60 og 61 í tíðarskeiðnum fram til Sandoyartunnilin er liðugur. Frá fólki, sum vóru á fundinum, verður sagt, at umboðini fyri SSL m.a. boðaðu frá, at tveir teir seinastu túrarnir á degnum verða tiknir av ferðaætlanini hjá Teistanum, og í staðin skal ferjan Hasfjord røkja hesa siglingina. Sambært umboðunum frá SSL var orsøkin manglandi játtan.

Gongst sum ætlað, verður koyrandi millum Streymoynna og Sandoynna í 2023. Tað eru altso í minsta lagi trý ár eftir, har fólk og virksemi í Sandoynni í stóran mun eru tengd at almennu samferðsluni. Spyrjarin vitjar javnan á Sandoynni og hevur ongantíð upplivað, at tað hava verið færri enn 12 fólk við seinasta túrinum. Eru tiltøk ella veitslur í oynni eru tað stórir bólkar av fólki, sum hava fyri neyðini at sleppa heim aftur við einum av kvøldtúrunum. Tað undrar spyrjaran, at tað verða gjørdar so stórar tillagingar á leiðini so langt áðrenn tunnilin er liðugur. Sannlíkt fer hetta at hava neiliga ávirkan á trivnaðin í oynni. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 2. mars 2020

Aksel V. Johannesen